## Brasiliumaður vann EM

Marcos Senna, sum í bæði EM og í sponsku la Primera hevur imponerað við støðugt góðum spæli, skrivaði søgu, sum fyrsti brasiliumaðurin, ið hevur vunnið EM-heitið í fótbólti. Senna er nevnliga upprunaliga úr Brasil, men hann er síðani naturaliseraður, soleiðis at hann nú hevur spanskt stempul í passinum. Og tað er ein avgerð, sum allir spaniólar í dag munnu fegnast um.



## Fyrsta steypið hjá Torres

Fernando Torres var sum vera man bæði errin og fegin, tá hann við sínum máli hevði tryggjað Spania sigurin móti Týskland. - Hetta er ein fantastisk kensla, og beint nú skilja vit slettis ikki, hvussu stórt hetta er. Hetta er eisini fyrsta steypið, sum eg havi vunnið, so bara tað í sjálvum sær er ein dreymur, sum nú er gingin út. Eg eri errin av, at vit nú kunnu njóta sigurin, og eg eri errin av, at somikið nógv fólk eru glað okkara vegna, segði Torres, sum skoraði tvær ferðir í endaspælinum.

# iðið vann



aloftast út av lagi vánaligur. Og ístaðin var fleiri ferðir um reppið, at Spania økti. Ikki minst tá Senna var sentrum í einum framúrskarandi álopi, men sami Senni var akkurát nakrar sentimetrar ov stuttur, tá hann skuldi beina bóltin í manntóma týska málið.

### Heimsins bestu

Men tað slapp ikki at skugga yvir gleðini, tá dómarin hevði floytað fyri seinatsu ferð. Spania hevur ofta verið stóra vónbrotið í bæði EM- og HM-endaspølum, tá úrtøkan ikki hevur staðið mát við annars góða spælið.

Hesa ferð var tó eingin, sum stóð spaniólum kurl. Og tá Iker Casillas fór upp eftir stóra steypinum mundi einasti spurningurin vera, um talan júst nú ikki er um heimsins sterkasta landslið, sum tók ímóti heiðrinum, sum spælararnir so ruddiliga høvdu uppiborið.

## FAKTA um finaluna

**Týskland-Spania 0-1 (0-1)**
**0-1:** Fernando Torres, 33

| | |
|---|---|
| **Skot (á málið):** | |
| Týskland 4(3) | Spania 14(8) |
| **Fríspørk** | |
| Týskland 20 | Spania 19 |
| **Hornaspørk** | |
| Týskland 4 | Spania 7 |
| **Rangstøða** | |
| Týskland 5 | Spania 4 |
| **Possession** | |
| Týskland 53% | Spania 47% |

**Týskland**: Jens Lehmann, Cristoph Metzelder, Arne Friedrich, Philip Lahm (Marcell Jansen, 46.), Per Mertesacker, Thomas Hitzlsperger (Kevin Kuranyi, 58.), Torsten Frings, Michael Ballack, Bastian Schweinsteiger, Miroslav Klose (Mario Gomes, 79.), Lukas Podolski
**Gult kort**: Michael Ballack, Kevin Kuranyi
**Spania**: Iker Casillas, Carlos Marchena, Carles Puyol, Joan Capdevilla, Sergio Ramos, Xavi, Andrés Iniesta, Marcos Senna, Cesc Fábregas (Xabi Alonso, 63.), David Silva (Santi Cazorla, 66.), Fernando Torres (Daniel Güiza, 78.)
**Gult kort:** Iker Casillas, Fernando Torres



*Eingin ivast í, at Michael Ballack er ein av heilt stóru spælarunum í heiminum seinastu 10 árini. Næstu ferð fyllir hann 32 ár, men enn er stóra gullmerkið ikki komið til høldar*
*Mynd: Polfoto/AP*

# Taparin Ballack

**EM-finalan gjørdist enn eitt vónbrot av mongum hjá Michael Ballack, sum enn ikki hevur vunnið sær tann altjóða heiður, sum evnini annars skuldu borgað fyri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi, um tú spyrt ein týskara, hvør størsti fótbóltsspælari teirra hevur verið seinastu 10 árini ella so.

Michael Ballack hevur hesi árini verið støðugi miðvallarmotorurin á landsliðnum, og ofta hevur vónin um týskan sigur staðið og fallið við honum.

Hinvegin skerst heldur ikki burtur, at Michael Ballack einum týskara so ólíkt hevur tapt meira enn tey flestu. Týsk meistaraheiti við Kaiserslautern og Bayern München viga sjálvandi rætta vegin, men í nógv størri mun er søgan um Ballack ein søga um spælaran, sum ikki rakk á hægstu tindarnar.

Í 2001 var hann partur av Leverkusen-liðnum, sum vann silvur í Bundesliguni, týsku steypakappingini í Champions League. Hann var partur av liðnum, sum vann HM-silvur í 1998, tó at hann var leikbannaður í finaluni. Hann var skaddur, tá Týskland vann HM-bronsu fyri tveimum árum síðani, og bæði í ár og í fjør hevur hann verið partur av einum Chelsea-liði, sum er endað á silvurplássinum í ensku Premier Leage. Í ár enntá eisini við silvurmerkjum í Champions League sum úrtøku.

Og so var tað sjálvandi eisini EM-finalan. Har var til tað seinasta ivasamt, um Ballack yvir høvur var til reiðar at spæla.

Og tó at hann at enda varð sagdur at vera klárur, so stóð øllum greitt, at skaðin darvaði týska skiparanum meira, enn gott var. At hann mátti út av vøllinum at seymast, tá hann hevði verið í loftdysti við Senna, var bara við til at styrkja ímyndina av einum særdum krígsmanni, sum ikki megnaði at venda hóttandi gongdini í dystinum. Einum dysti, har Týskland meira enn nakran tíð hevði tørv á einum stórspælandi Michael Ballack.

Út fór hann tó ikki. Saman við liðfeløgunum royndi Ballack til tað seinasta at liva upp til tey so væl kendu orðini hjá Gary Lineker, men hesa ferð vildi lagnan tað øðrvísi. Týskland megnaði ikki at vinna sína sættu EM-finalu, og hjá Ballack gjørdist talan enn einaferð um silvur til savnið.